# LEIÐSLU HONDBÓKIN

## 2021

FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA

# FORORÐ

Endamálið við hesari leiðsluhondbók er at geva nevndarlimum og øðrum, sum á ein ella annan hátt eru knýtt at føroyskum fótbóltsfeløgum, møguleika at kunna seg um viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri raksturin av einum fótbóltsfelagi.

Leiðsluhondbókin skal ikki metast sum ein útgreining av, hvussu eitt felag eigur og skal skipast, men sum eitt hent amboð hjá serliga nýggjum innan fótbóltsheimin, ið ynskja betur innlit í, hvat krevst fyri at reka eitt fótbóltsfelag.

Ætlanin er, at hondbókin verður dagførd á hvørjum ári við viðkomandi broytingum.

**LEIÐSLUHONDBÓKIN 2021**
Fótbóltssamband Føroya, februar 2021
www.fsf.fo

Snið og umbróting: Pætur Eyðunsson Jensen / Droym.fo

# INNIHALD


**FORORÐ** . . . . . 3
**FELAGIÐ** . . . . . 7
**Viðtøkur** . . . . . 7
**Aðalfundur** . . . . . 7
Ungdómsnevnd . . . . . 8
Høvuðs-ungdómsvenjari . . . . . 8
Aðalfundur . . . . . 8
Samskipari . . . . . 8
Fótbóltsnevnd . . . . . 8
Inntøkubólkur . . . . . 8
Dómarabólkur . . . . . 8
**Bygnaður** . . . . . 8
Starvsnevnd . . . . . 8
Ungdómsnevnd . . . . . 11
Fótbóltsnevnd . . . . . 11
Dómarabólkur . . . . . 12
Samskipari . . . . . 12
Høvuðsungdómsvenjari . . . . . 13
**Virðisgrundarlag** . . . . . 14
**Fíggjarviðurskifti** . . . . . 15
Fíggjarætlan . . . . . 16
Roknskapur . . . . . 16
**Klubhondbók** . . . . . 17
Innihald . . . . . 17
MAFF Stuðul . . . . . 19
**MAFF stuðul** . . . . . 19
**STUÐULSSKIPANIR** . . . . . 19
**Stjørnufótbóltur og fótbóltsmennaraskipanin** . . . . . 20
**Stuðul til venjarar hjá U15 og U18 gentum** . . . . . 21
Krøv til venjaran . . . . . 21
**Hattrick grunnurin** . . . . . 21
**Náttúruvanlukkugrunnur hjá UEFA** . . . . . 21
Flytingar-gluggin 2021 . . . . . 22
**LEIKARIN** . . . . . 22
**Leikaraloyvi** . . . . . 22
**Limagjald** . . . . . 23
**Comet Play** . . . . . 24
**Trygging** . . . . . 24
**Yrkisleikarar** . . . . . 25
**Útlendskir yrkisleikarar** . . . . . 26
**Uppalingarpengar** . . . . . 27
**Millummenn** . . . . . 30

# INNIHALD


**VENJARIN** . . . . . 32
**Krøv til venjaraprógv** . . . . . 32
Betri Deildin menn . . . . . 32
1. Deild menn . . . . . 32
Betri Deildin kvinnur . . . . . 32
**Venjaraskeið** . . . . . 33
**Venjarasáttmáli** . . . . . 34
**Ítróttafrádráttur** . . . . . 34
**Revsiváttan** . . . . . 35
**KAPPINGARÁRIÐ** . . . . . 36
**Tilmelding** . . . . . 36
Loyvisskipanin . . . . . 36
Comet . . . . . 37
Kærur . . . . . 38
**Reglugerðir um anti-doping og match fixing** . . . . . 38
Anti Doping . . . . . 38
Match Fixing . . . . . 39
**Dómarar og døming** . . . . . 40
Dómaraskeið . . . . . 41
Dómaraskamskipari . . . . . 41
Felagsstev og stevnan . . . . . 43
Altjóða luttøka . . . . . 44
Lutakast . . . . . 44
Leikarar . . . . . 44
Umboð frá UEFA og dómarar . . . . . 44
Leikvøllir . . . . . 45
**SJÁLVBOÐIN** . . . . . 48
Varðveita hjálparfólk . . . . . 50


**Eru tykkara viðtøkur dagførdar, so tær samsvara við, hvussu felagið verður rikið?**

Um tit ivast í hesum, kunnu tit seta tykkum í samband við loyvisstjóran hjá FSF, Ronnie Háfoss, ið kann vegleiða tykkum og hjálpa tykkum at dagføra viðtøkurnar.

# FELAGIĐ

Øll feløg eru ymisk, og tí eru tað ikki tvey feløg, ið verða rikin eins. Ein loysn kann tí vera tann rætta fyri eitt felag, men merkir ikki, at hetta er rætta loysnin fyri eitt annað felag. Tað er tí týdningarmikið, at man ikki bert avritar loysnir hjá øðrum feløgum, men at man dugir at síggja eina loysn út frá tørvinum í egnum felagi við íblástri frá øðrum.

## VIÐTØKUR

**Viðtøkurnar hjá einum felagi** eru løgfrøðiliga útgangsstøðið fyri, hvussu felagið verður skipað, og hvussu bygnaðurin í felagnum skal vera. Viðtøkurnar eiga at innihalda ásetingar um millum annað:

- Hvat endamálið hjá felagnum er
- Nær aðalfundur skal haldast
- Hvussu starvsnevndin skal vera skipað
- Hvør hevur tekningsrætt fyri felagið, og hvør heftir fyri felagið

Tað er týdningarmikið, at starvsnevndin hevur innlit í viðtøkurnar, tá felagið skal skipast, og tá avgerðir skulu takast.

Viðtøkurnar eiga at lýsa endamálið við felagnum, og eru tær tí eisini týdningarmiklar fyri, hvussu felagið lýsir seg.

## AÐALFUNDUR

**Aðalfundurin er hægsti** myndugleikin hjá felagnum. Viðtøkurnar skulu lýsa, nær aðalfundurin skal vera hildin, og hvussu hesin skal skipast. Viðtøkurnar skulu eisini lýsa, nær aðalfundurin er viðtøkuførur, og undir hvørjum treytum avgerðir kunnu/skulu takast. Viðtøkurnar lýsa, hvør hevur atkvøðurætt á aðalfundinum.

Aðalfundur skal vera hildin árliga, og tað er aðalfundurin (ella eyka aðalfundur), ið velur starvsnevnd felagsins. Starvsnevndin er hægsti dagligi myndugleikin í felagnum og hevur ábyrgdina av felagnum millum aðalfundirnar.

Limir felagsins hava á aðalfundinum møguleika at koma við sínum viðmerkingum til raksturin av felagnum, og harvið eisini gera sína ávirkan galdandi.

# BYGNAÐUR

Tað er upp til einstaka felagið at avgera, hvussu bygnaðurin í felagnum skal vera. Tað er tó týdningarmikið, at felagið verður skipað sambært viðtøkunum, tí annars er møguleiki fyri, at ein ella fleiri persónar virka uttan heimild í felagnum.

**At felagið er væl skipað** við fólki við røttum førleikum er allarhelst týdningarmiklasta fortreytin fyri at skapa framgongd og menning. Um felagið er væl skipað er tað meira eggjandi at vera sjálvboðin í felagnum, og tað kann tí vera við til at tað gerst lættari at fáa fleiri fólk at gerast partur av felagnum.

Felagið eigur at vera bygt á ein einfaldan og greiðan hátt, har tað greitt framgongur, hvørjar leiðslu- og ábyrgdarfunktiónir eru í felagnum. Her sæst eitt uppskot um, hvussu eitt felag kann vera skipað:




## Starvsnevnd

**Starvsnevndin** er hægsti dagligi myndugleikin í felagnum Í einum og hvørjum felagi hevur leiðsla ein avgerandi leiklut, bæði um talan er um smærri ítróttarfeløg ella um størri altjóða fyritøkur við túsundtals starvsfólkum. Leiðslan hevur ábyrgdina av at skipa virksemið í felagnum og tryggja eina framtíðar menning av felagnum.

### Ábyrgdin hjá starvsnevndini er millum annað:

- Tryggja raksturin av felagnum, bæði fíggjarliga og ítróttarliga
- Áseta rammurnar fyri virksemi í felagnum (mál og ætlanir)
- Halda regluligar starvsnevndarfundir og tryggja, at fundarfrásagnir verða skrivaðar
- Samstarva við uttanhýsis samstarvsfelagar (t.d. kommuna, myndugleikar og stuðlar)
- Samskifta og samstarva við starvsfólk, undirnevndir og limir felagsins
- Umboða felagið bæði innanlands og uttanlands

Viðtøkur felagsins áseta, hvussu starvsnevndin skal vera skipað, men eigur starvsnevndin í minsta lagi at hava fylgjandi persónar

- Formann/kvinnu
- Næstformann/kvinnu
- Kassameistara
- Skrivara
- Nevndarlim
- Eyka nevndarlim

Tá aðalfundurin hevur valt starvsnevndina, skipar nevndin seg. Viðtøkur felagsins eiga at áseta, hvussu nevndin skal skipast.

Niðanfyri eru nakrir nevndarlimir og teirra uppgávur nevndar.

### Formaður/kvinna

- Eigur at luttaka á øllum starvsnevndar- og aðalfundum
- Ger fundarskrá og hevur ábyrgd av at kalla inn til starvsnevndarfund og at trygga, at hesir vera hildnir sambært viðtøkum felagsins
- Hevur tekningsrætt fyri felagið (møguliga saman við kassameistara)
- Tryggjar at avgerðir hjá starvsnevndini vera framdar
- Kunnar starvsnevndina um týdningarmikil mál
- Myndar felagið í miðlum
- Umboðar felagið á fundum hjá FSF (m.a. formansfundum og aðalfundi)

### Skrivari

- Skriva fundarfrásøgn frá starvsnevndar- og aðalfundum

### Kassameistari

- Ábyrgd av fíggjarliga rakstrinum hjá felagnum
- Kunnar starvsnevndina um fíggjarstøðu felagsins, og hvørt hendan er í samsvari við fíggjarætlan felagsins
- Tryggjar, at bókhald felagsins er dagført
- Tryggjar, at ongar útreiðslur vera framdar, uttan at avgerð er tikin av starvsnevndini ella teimum, ið hava heimild til hetta
- Tryggjar, at allar inntøkur verða fluttar felagnum (t.d. stuðulsavtalur) og at rykt verður eftir pengum, ið felagið hevur til góðar
- Ábyrgd av fíggjarliga rakstrinum hjá felagnum, og at felagið hevur eina greiða fíggjarætlan

Í onkrum førum kann tað møguliga vera ein skilagóð loysn at velja ein uttanhýsis dygdargóðan bókhaldara, sum eisini, tá talan er um skatt og meirvirðisgjald, hevur fakligan førleika at tryggja, at farið verður fram á lógligan hátt.

### Undirnevndir og arbeiðsbólkar

Starvsnevndin hevur evstu ábyrgd av rakstrinum av felagnum, men fyri at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá starvsnevndini, kann felagið skipa undirnevndir og/ella arbeiðsbólkar, ið kunnu hava smærri og størri arbeiðsuppgávur. Hetta gevur samstundis eisini fólki møguleika at luttaka í felagsarbeiðnum við at átaka sær smærri uppgávur.

Undirnevndir og arbeiðsbólkar eru vanliga minni nevndir, ið hava eina ítøkiliga arbeiðsuppgávu. Hetta kann millum annað vera ein ungdómsnevnd ella ein arbeiðsbólkur, ið hevur ábyrgd av einum størri inntøkutiltaki, sum tildømis at fyriskipa ein fótbóltsskúla.

Undirnevndir/arbeiðsbólkar eiga at seta fram tilmæli til starvsnevndina, sum tekur endaligar avgerðir. Starvsnevndin kann eisini heimilda einari undirnevnd at taka ávísar avgerðir (treytað av, at heimild er til hetta í viðtøkum felagsins).

Felagið eigur at hava greiðar reglur fyri, hvørjar undirnevndir og arbeiðsbólkar kunnu mannast. Samstundis sum hesar reglur eisini skulu taka atlit til, hvørjar heimildir einstøku undirnevndirnar og arbeiðsbólkarnir hava. Tað er týdningarmikið, at undirnevndir og arbeiðsbólkar ikki fara út um sínar heimildir, men virka innanfyri tað, ið er avtalað við starvsnevndina. Undirnevndir og arbeiðsbólkar eiga tí regluliga at kunna starvsnevdina um teirra virksemi. Møguleiki er eisini fyri, at týdningarmiklar undirnevndir, m.a. ungdómsnevnd, hava umboð í starvsnevndini, so tað altíð er eitt tætt tilknýti millum hesar.

***Nøkur hugskot til undirnevndir og arbeiðsbólkar eru:***

- Ungdómsnevnd
- Fótbóltsnevnd
- Inntøkubólkur/stuðulsfelag
- Húsabólkur
- Trivnaðarbólkur
- Fjepparabólkur/fjepparafelag (møguliga sum sjálvstøðugt felag)

Her er tó týdningarmikið at hava í huga, at tað kann vera ein fyrimunir, at somu persónar ikki ganga aftur í øllum nevndum/bólkum, tí so er allarhelst ikki nógv vunnið, tí ábyrgdin endar tá aftur á teimum somu persónum, men bert undir ymiskum heitum.

---

## Kaj Leo Holm Johannesen, *Havnar Bóltfelag*

**Stuðlafelagið hjá Havnar Bóltfelag, HB-stuðlar, varð stovnað í 1979 og hevur síðani tá havt ein týdningarmiklan leiklut fyri Havnar Bóltfelag.**

*Stuðlafelagið skipar á hvørjum ári fyri ymiskum størri og minni inntøkutiltøkum, so sum innandurakapping og marknaðardegi.*

*Stuðlafelagið veitir og hevur veitt fíggjarligan stuðul til mong ymisk tiltøk hjá felagnum. HB-stuðlar vóru í 1993 við til at fíggja ein part av núverandi HB húsinum.*

*Aftrat hesum er stuðlafelagið eisini við til skipa fyri fjepparatiltøkum áðrenn heimadystir og bussferðum til útidystur, ið hava verið ókeypis seinastu trý árini.*

## Rúni Herup Olsen, *B36*

**B36 hevur í nógv ár havt eina væl virkandi ungdómsnevnd. Ungdómsnevndini hevur í B36 ábyrgdina av barna- og ungdómsfótbóltinum í felagnum.**

*Uppgávurnar hjá ungdómsnevndini eru millum annað at seta venjarar og hjálparvenjarar til barna- og ungdómsliðini, tryggja at neyðuga útgerðin er til taks og skipa fyri foreldrafundum. Aftrat hesum hevur ungdómsnevndin eisini skipað fyri sosialum tiltøkum fyri limum felagsins, eitt nú jólahald og endaveitslum.*

*Fyri at tryggja eitt gott samstarv og samskifti millum starvs- og undómsnevnd er formaðurin í ungdómsnevndini fastur limir í starvsnevndini. Ungdómsnevndin leggur á hvørjum ári eina fíggjarætlan fram fyri starvsnevndina.*

*Tað eru okkara royndir, at ein góð ungdómsnevnd kann lætta nógv um arbeiðið hjá starvsnevndini. Tí tá hevur starvsnevndin møguleika fyri at hava fokus á øðrum uppgávum í felagnum, men samstundis vera væl vitandi um, at barna- og ungdómsfótbólturin er í tryggum hondum. Hetta merkir tó eisini, at tað er týdningarmikið, at man finnur tey røttu fólkini at sita í nevnd, bæði í starvsnevnd og í undirnevndum.*

## Ungdómsnevnd

Ungdómsnevndin kann vera mannað av 3-5 persónum, har ungdómsnevndin eisini hevur umboð í starvsnevnd felagsins. Ungdómsnevndin skipar saman við høvuðsungdómsvenjara felagsins virksemið fyri barna- og ungdómsfótbóltin í felagnum, m.a. við at seta venjarar og tryggja, at øll viðkomandi útgerð er tøk.

## Fótbóltsnevnd

Eins og tað kann vera hent hjá felagnum at hava eina nevnd, ið hevur ábyrgd av barna- og ungdómsfótbóltinum í felagnum, kann tað eisini viðmælast, at felagið hevur eina nevnd/arbeiðsbólk, ið hevur ábyrgd av besta liðnum hjá monnum og kvinnum í felagnum (talan kann eisini vera um tveir bólkar, ið hava ábyrgd av ávíkavíst besta liðnum hjá monnum og besta liðnum hjá kvinnum).

Fyrimunurin við einari slíkari skipan er, at hetta kann vera við til, at arbeiðsbyrðan í felagnum verður deild út á fleiri herðar.

Um eitt felag velur at skipa ein slíkan arbeiðsbólk, er altavgerandi, at tað er greitt avtalað, hvønn leiklut og hvørjar heimildir slíkur arbeiðsbólkur hevur. Her verður serliga hugsað um heimildir til at gera avtalur við leikarar og stuðlar, tí hetta kann hava stóra ávirkan fyri felagið sum heild.

## Dómarabólkur

Endamálið við at hava ein dómarabólk er, at felagið hevur ein ella fleiri persónar, ið hava ábyrgdina av dómarum og døming í felagnum. Bæði tá talan er um áseting, rekruttering og menning.

Dómarabólkur telur minst ein persón, men tað er ynskiligt, at dómarabólkurin telur í minsta lagi tveir persónar, ið eru: Dómarasamskiparin (les meira um dómarasamskiparan á síðu 41) og ein dómaramennari.

***Uppgávan hjá dómaramennaranum er:***

- Saman við felagnum hjá sær hevur hann evstu ábyrgd av samskiftinum millum felagið og FSF um døming
- Hann skal leita eftir fólki sum hava evni og áhuga at døma
- Finna evnagóðar dómarar (talent)
- Skapa eitt gott dómaraumhvørvi
- Vegleiða tey, sum heimafelagið setur at døma

Dómaramennarin skal hava ávísar royndir sum dómari og/ella hjálpardómari.

Afturat dómaramennaranum hjá felagnum hevur FSF 4 mennarar, sum koma at vitja feløgini eftir nærri avtalu og vegleiða dómaramennaran hjá felagnum í hansara virksemi.

Eru spurningar ella ivamál viðvíkjandi dómaramennarum, er møguleiki at seta seg í samband við dómaraleiðaran hjá FSF, Lassin Isaksen

## Samskipari

Góð umsitingarlig viðurskifti eru ein treyt fyri einum vælvirkandi felagi. Tað er tí týdningarmikið, at feløg raðfesta hendan leiklutin í felagnum. Samskiparin hevur fleiri skrivstovuuppgávur í felagnum, og hetta kann eisini vera við til at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá starvsnevndini. Hesin leikluturin er tí av stórum týdningi og eigur at raðfestast og styrkjast.

Samskiparin eigur at vera bindilið millum allar nevndir og arbeiðsbólkar í felagnum.

Ymiskt er, hvørjar uppgávur samskiparin tekur sær av í felagnum. Tað verður tó mælt til, at samskiparin í minsta lagi hevur ábyrgd av fylgjandi uppgávum (ella hevur ábyrgdina av, at onnur røkja uppgávurnar):

- Tilmelding av liðum
- Samskipan av dystartíðum
- Samskipan av venjingartíðum
- Áseting av dómarum til dystir, har FSF ikki setur dómarar
- Ábyrgd av leikaraloyvum
- Ábyrgd av Comet og TMS skipanini fyri felagið
- Ábyrgd av loyvisumsókn hjá felagnum
- Umsiting av samskifti hjá felagnum

Fótbóltssambandið gevur feløgunum stuðul til at seta umsitingarligan samskipara (les meira um hetta undir MAFF undir stuðulsskipanir á síðu 19).



## Høvuðsungdómsvenjari

Høvuðsungdómsvenjarin eigur at hava fótbóltsfakligu ábygdina av barna- og ungdómsfótbóltinum í felagnum. Hendan uppgávan inniber millum annað at ráðgeva, menna og vegleiða øllum barna- og ungdómsvenjarum í felagnum, samstundis sum høvuðsungdómsvenjarin er við at tryggja eitt gott venjingarstøði og trivna hjá íðkarum í felagnum.

Feløgini fáa fíggjarligan stuðul frá Fótbóltssambandi Føroya til høvuðsungdómsvenjara. Hetta er partur av skipanini við Stjørnufótbólti, har ávís krøv skulu verða uppfylt fyri, at feløg kunnu fáa stuðul (les meira um Stjørnufótbólt undir stuðulsskipanir á síðu 19).

Tað er týdningarmikið, at starvsinnihaldið hjá høvuðsungdómsvenjaranum er útgreinað í einum skrivligum sáttmála millum felagið og høvuðsungdómsvenjaran. Her eigur millum annað at vera útgreinað, hvørji ábyrgdarøki hjá høvuðsungdómsvenjaranum eru, og hvussu nógvar tímar um vikuna høvuðsungdómsvenjarin arbeiðir, og hvør lønin er.

Fótbóltssambandið ásetur ábyrgdarøki, ið høvuðsungdómsvenjarin skal hava, um felagið ynskir at fáa stuðul umvegis Stjørnufótbóltin.

Feløg kunnu hava tveir høvuðsungdómsvenjarar. Eitt nú ein til dreingjaspælarar og annan til gentuspælarar.




# VIRÐISGRUNDARLAG

Flestu kenna allarhelst virðissetningin hjá FC Barcelona "Mes que un club" (meira enn eitt felag). Við einum greiðum virðisgrundarlagi hevur FC Barcelona avgjørt, hvat fyri virði, ið felagið skal byggja á og hvat endamálið við felagnum er. Tað er tí allarhelst ikki av tilvild, at felagið telist millum tey fremstu, bæði á og uttanfyri vøllin.

**Tað er tó ikki bert FC Barcelona**, ið kann hava ágóðan av at hava eitt greitt virðisgrundarlag. Hvat er virðisgrundarlagið hjá tykkara felagið, og hvørji virðir byggja tit felagið á? Hetta er eitt sera týdningarmikið kjak, ið øll feløg eiga geva sær stundir til.

Øll feløg hava ágóðan av, at man ásetur eitt greitt virðirsgrundarlag, ið er ein lýsing av, hvussu man ynskir at reka felagið. Hetta skal vera "eksistensgrundarlagið" undir felagnum og við tí gera eina ætlan fyri, hvørja kós, ið man ynskir felagið skal seta og hvussu man skal koma har til.

Virðisgrundarlagi eigur at vera grundsteinur undir øllum virkseminum, ið felagið hevur. Málsetningar, virkisætlanir, og onnur amboð, ið felagið brúkar í dagligdegnum eigur altíð at vera gjørt við útangsstøðið í virðisgrundarlagnum, og ikki umvent. Eitt virðisgrundarlag er meira enn bara ein staðfesting av, at man ynskir at vera í fremstu røð. Í veruleikanum er virðisgrundarlagi í størri mun ein staðfesting av, hvat er sermerkt fyri júst okkara felag, og hvørjar kappingarfyrimunir, ið okkara felag hevur.

Um felagið hevur ein greiðan samleika verða virðini eisini umdømi hjá felagnum.

Um tykkara felag ikki hevur eitt niðurskrivað virðisgrundarlag vil FSF fegin hjálpa við at fáa gongd á hetta arbeiðið og fáa tað framt í verki. Um hetta hevur tykkara áhuga eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við Andrass Thomsen á ath@football.fo

# FÍGGJARVIÐURSKIFTI

Fíggjaviðurskifti felagsins mugu vera væl skipað fyri at tryggja, at felagið er væl rikið. Er skil í fíggjarviðurskiftinum hjá felagnum, gevur hetta ein tryggleika til felagið og tey, ið hava ábygrdina av og eru partur av felagnum.

**Eitt fótbóltsfelag hevur nógvar ymiskar fíggjarligar skyldur**, ið kunnu vera alt frá løn til yrkisleikara til útgerð til reinhald av felagshúsinum. Afturat hesum eru eisini nógvar reglur innan skatt og MVG, sum starvsnevndin skal hava innlit í.

Tíverri verður ein størri og størri partur av arbeiðsorkuni hjá nevndum brúktur til at skaffa pening til felagið og harvið tryggja at raksturin melur runt. Hetta hevur við sær, at arbeiðsorkan ikki verður brúkt til tað, ið er mest týdningarmikið: Fótbólt. Í longdini kann hetta hava við sær, at fleiri missa hugin at vera partur av felagnum, tí flestu hava ikki boðið seg til at vera í eitt nú starvsnevndini fyri bert at savna pening inn.

Um vit ynskja sterk feløg, ið kunnu seta sær greið mál og hava eina ætlan fyri menningina av felagnum, so er týdningarmikið, at tað er kontinuitetur í leiðslunum í feløgum, tí vit hava tørv á leiðarum og nevndarlimum, ið hava orku at vera við til at menna felagið og føroyskan fótbólt. Góð fíggjarstýring er tí ein týðandi partur av grundarlagnum fyri at skipa eitt væl rikið og virkið felag.

Tað er tí týdningarmikið, at felagið hevur nakrar greiðar reglur fyri fíggjarviðurskifti felagsins, og at starvsnevndin á hvørjum ári leggur eina greiða fíggjarætlan.

Inntøkur felagsins eiga altíð at verða fluttar beinleiðis á kontu felagsins og ongatíð umvegis privatar kontur hjá starvsnevndarlimum ella øðrum í felagnum. Viðmælt verður øllum feløgum at hava eina skipan, ið krevur at tveir ella fleiri persónar góðkenna allar flytingar, ið verða framdar av kontu felagsins. Intranet skipanin hjá FSF, ið øll feløg hava atgongd til, inniheldur eina skipan við faktura góðkenning.

Tað er eisini týdningarmikið, at felagið hevur greiðar reglur fyri, hvør kann binda felagið fíggjarliga, bæði tá talan er um smærri og størri útreiðslur. Tað er samstundis av avgerandi týdningi, at øll ábyrgdarfólk í felagnum eru vitandi um hesar reglur og virða tær.

Felagið eigur at hava greiðar mannagongdir fyri, hvussu kontur til eitt nú innsavning av peningi til uttanlandsferðir vera skipaðar, og hvør hevur ábyrgdina av hesum. Tí vandi kann vera fyri, at felagið endar við at hefta fyri ógóldnum útreiðslum.

Ætlanin við hesari vegleiðing er ikki at gera eina útgreinaða gjøgnumgongd av fíggjarligum skyldum felagsins. Ein gjøllari vegleiðing um skatta og MVG viðurskifti hjá ítróttarfeløgum er at finna á heimasíðuni hjá ÍSF, www.isf.fo

## Fíggjarætlan

Starvsnevndin hevur ábyrgd av, á hvørjum ári at leggja eina greiða fíggjarætlan fyri árið. Fíggjarætlanin inniheldur allar inntøkur og útreiðslurnar, ið felagið hevur.

Fíggjarætlanin eigur at vera grundarlagið fyri, hvørjar ítróttarligar ætlanir, ið felagið hevur til komandi kappingarárið. Ítróttarliga virksemið má altíð vera í samsvar við fíggjarligu førleikarnar hjá felagnum. Tað er starvsnevndin, ið hevur evstu ábyrdina av, at tað er samsvar millum inntøkur og útreiðslur, og at felagið hevur eitt nøktandi gjaldføri.

Ein greið og eftirfarandi fíggjarætlan er eitt sera týdningarmikið amboð hjá starvsnevndini, tá metast skal um, hvørt neyðugt er at lækka útreiðslurnar ella finna nýggjar inntøkumøguleikar. Bæði inntøkur og útreiðslur eiga at vera mettar realistiskt. Serliga inntøkur eiga at vera mettar varliga. Felagið eigur ikki at taka óvissar inntøkur við í fíggjarætlanina, tí vandi er fyri, at hesin peningurin ongantíð verður tøkur, og felagið kemur tá í eina trupla fíggjarliga støðu, ið kann ávirka raksturin í felagnum. Afturat hesum eigur rúm eisini at vera fyri óvæntaðum útreiðslum.

Kassameistarin eigur regluliga (mánaðarliga) at kunna starvsnevndina um fíggjarstøðu felagsins og um hendan er í tráð við fíggjarætlanina, ið starvsnevndin hevur samtykt. Hóast tað er kassameistarin (ella annar persónur), ið hevur dagligu umsitingina av fíggjaræltanini, so er tað týdningarmikið at hava í huga, at tað er øll nevndin í felagnum, ið hevur ábyrgdina av, at fíggjarætlanin verður hildin og at felagið verður rikið á ein skilagóðan hátt.

***Nakrar av teimum vanligu útreiðslunum hjá einum felagi kunnu vera:***

- Samsýning til venjarar og leikarar
- Tilmeldingargjøld
- Dómaragjøld
- Rakstur av felagshúsi
- Tryggingar
- Umsiting (td. limaskipan, roknskaparskipan, heimasíða)
- Keyp av útgerð (leikbúnar, bóltar, keylur v.m.)



## Roknskapur

Starvsnevndin skal á hvørjum ári leggja fram ein ársroknskap á aðalfundi felagsins. Á aðalfundinum skulu limir felagsins góðkenna roknskapin.

Feløg, sum luttaka í deildum, har umsókn um luttøkuloyvi verður sent FSF, skulu lata inn ein grannskoðaðan roknskap til FSF. Hesar treytir eru tí ikki galdandi fyri tey feløg, ið bert luttaka í lægri deildum (les meira um loyvisumsóknina á síðu 36).

Øll feløg, ið hava fingið váttað skattafrælsi frá TAKS, skulu tó lata inn ársroknskap til TAKS. Tað er tó ikki ein treyt, at hesin er grannskoðaður. Viðtøkur felagsins kunnu innihalda ásetingar um, at felagið skal hava ein grannskoðaðan roknskap, ið skal leggjast fram og góðkennast á aðalfundi felagsins.

# KLUBHONDBÓK

Skal eitt felag virka væl, er tað týdningarmikið, at dagliga gongdin í felagnum er væl skipað og niðurskriva. Tað ger tað lættari hjá øllum at vera partur av felagnum, og tað kann tá eisini vera lættari at fáa nýggj fólk knýtt at felagnum.

**Tað eru nógvar og ymiskar** uppgávur tengdar at rakstrinum av einum felagi, tí kann tað vera torført at hava yvirlit yvir allar uppgávur í felagnum. Tá útskifting er í eitt nú starvsnevndini, kann vera torført hjá nýggjum nevndarlimum at fáa yvirlit yvir allar uppgávur í felagnum, og tí kunnu onkrar týdningarmiklar uppgávur detta niður ímillum. Um fleiri nevndarlimir fara frá í senn, verður uppgávan enn størri hjá nýggju nevndarlimunum, ið skulu reka felagið víðari.

Fyri at tryggja eitt greiðari yvirlit yvir uppgávurnar í felagnum og fyri at gera tað lættari hjá nýggjum persónum í felagnum er skilagott, at felagið ger eina *klubhondbók*, ið inniheldur viðkomandi kunning um felagið og mannagongdir í felagnum. Um fólk hava eina kenslu av, at tað er skil á tingunum í felagnum, er tað altíð lættari at fáa tey at átaka sær minni og størri uppgávur.

Klubhondbókin kann samstundis vera við til at raðfesta og skipa uppgávurnar í felagnum, so allar tær tyngstu uppgávurnar ikki fella saman. Við einari greiðari ársætlan er møguligt at skapa betur yvirlit yvir arbeiði í felagnum, samstundis sum uppgávurnar kunnu skipast í góðari tíð.

At gera eina klubhondbók tekur tó nógva tíð og kann tí krevja nógva orku frá lyklapersónum í felagnum. Tí kann vera skilagott, at ein arbeiðsbólkur verður settur, ið einans hevur til uppgávu at gera eina klubhondbók.

Klubhondbókin eigur at taka útgangsstøðið í teimum mannagongdum og framferðarhattum, ið longu verða nýttar í felagnum, samstundis sum hon verður dagførd leypandi.

Klubhondbókin er eitt hent amboð hjá bæði nevndum, venjarum, starvsfólki, limum og foreldrum í felagnum. Fyri at øll í felagnum hava atgongd til klubhondbókina, kann viðmælast, at hon er tøk á heimasíðu felagsins. Á hendan hátt er tað eisini lættari at gera leypandi dagføringar.

## Innihald

Fyri at klubhondbókin skal vera løtt at brúka er týdningarmikið, at hon bert inniheldur viðkomandi tilfar og kunning. Tað er tí týdningarmikið, at hon er gjørd og skrivað út frá tí einstaka felagnum, og hvussu hetta felagið virkar. Tað er tó fleiri evni, ið altíð kunnu vera viðkomandi at hava við:

- Endamálsorðing hjá felagnum
- Virðisgrundarlag hjá felagnum
- Yvirlit yvir, hvussu felagið er skipað
- Ársætlan fyri felagið
- Samskiftiskunning



# STUÐULS-SKIPANIR

Fótbóltssambandið hevur ymsar stuðulsskipanir, har feløgini kunnu fáa stuðul. Talan er um tríggjar stuðulsskipanir, ið verða nærri lýstar niðanfyri:

- **MAFF stuðul**
- **Stjørnufótbóltur og fótbóltsmennaraskipanin**
- **Stuðul til venjarar hjá U15 og U18 gentum**
- **Hattrick grunnurin**
- **Náttúruvanlukkugrunnur hjá UEFA**

**Fótbóltssambandið letur hvørjum** felagi 5 atgongumerki og 2 VIP atgongumerki til formannin/forkvinnu til allar landsdystir á heimavølli og steypafinaluna. Hvørt felag fær afturat hesum 7 árskort, ið kunnu brúkast til allar dystir í Betri deildini.

## MAFF STUÐUL

**Øll felag** hava á hvørjum ári møguleika at søkja um MAFF stuðul frá Fótbóltssambandinum. Endamálið við MAFF stuðlinum er at styrkja fyrisitingarliga partin av feløgunum. Peningurin skal nýtast til fyrisiting av felagnum, og kann hann gjaldast til t.d. formansløn, samskiparaløn, bókhaldara, grannskoðara, loyvisumsiting, v.m.

Upphæddin, ið feløgini kunnu søkja um, er tengd av, hvørjari deild fremsta liðið hjá monnum leikar í.

***Møguleiki er at søkja um fylgjandi upphæddir:***

### MAFF Stuðul

**2020:**

- Liðini sum luttaka í Evropa (4 feløg): 90.000 kr
- Betri-deildin menn (ikki í Evropa): 148.000 kr
- 1. Deild menn: 128.000 kr
- Restin: 60.000 kr

**2021:**

- Liðini sum luttaka í Evropa (3 feløg): 0 kr
- Betri-deildin menn (ikki í Evropa): 188.000 kr
- 1. Deild menn: 128.000 kr
- Restin: 60.000 kr

*Peningurin skal nýtast til umsiting, og FSF umsitingin fer í nærmastu framtíð at senda skriv til feløgini, har biðið verður um útgreining av, hvussu peningurin 2020 skal nýtast.*

# STJØRNUFÓTBÓLTUR OG FÓTBÓLTS-MENNARASKIPANIN

**Skipanin Stjørnufótbóltur** skal í fyrsta lagi eggja feløgunum til at gera eitt dygdargott og miðvíst arbeiði innan barna- og ungdómsfótbóltin, og annars at skapa góðar karmar fyri grasrótarfótbóltinum sum heild.

Við Stjørnufótbóltinum er FSF við til at stuðla feløgunum í teirra barna- og ungdómsarbeiði, har feløgini eftir nærri ásettum treytum fáa stuðul frá FSF.

Skipanin við Stjørnufótbólti var dagførd á aðalfundinum 2019. Nýggja skipanin verður meira einføld at umsita. Partur av stuðlinum fer til høvuðsungdómsvenjaran, meðan ein partur verður veittur sum stuðul í mun til talið av ungdómsleikarum, sum leika fyri viðkomandi felag og sum gjalda limagjald til felagið.

Sum liður í framhaldandi menningini av føroyskum fótbólti heldur fótbóltsmennaraskipanin fram í 2021. Hendan skipanin hevur seinastu tvey árini verið tætt samantvinnað við stjørnufótbóltsskipanina og tí er nú gjørt av, at í 2021 verður umsóknin um luttøku í fótbóltsmennaraskipanini og stjørnufótbóltskipanini løgd saman.

Høvuðsendamálið við báðum skipanum er framhaldandi at menna barna- og ungdómsfótbóltin kring landið.

Høvuðsungdómsvenjarin (hesin skal hava í minstalagi UEFA B-venjaraprógv.

***Felag, ið luttekur í UCL 0,00 kr. (vinnarin av Betri deildini 2020)***

***Feløg, ið luttaka í UEL og UECL 50.000,00 kr.***

***Hini feløgini 100.000,00 kr.***

Harumframt kunnu øll feløg (uttan UCL felagið) søkja um eyka stuðul upp til 50.000,00 kr. í einari krónu fyri krónu skipan.

Upphædd pr. leikara

Feløg verða lønt alt eftir talið av skrásettum leikarum (í Comet) í aldrinum 5-17 ár. Hendan upphæddin er í 2021 ásett til kr. 500,00 pr. leikara, ið er skrásettur í Comet í aldrinum 5 – 17 ár.

***Treytir fyri luttøku í bæði fótbóltsmennara- og stjørnufótbóltskipanini:***

### Felagið hevur ábyrgdina av:

- At hava ein fastan kontaktpersón, sum fótbóltsmennarin samskiftir við um praktisk viðurskiti (hetta skal helst vera høvuðsungdómsvenjarin)
- At høvuðsungdómsvenjarin arbeiðir samsvarandi menningarætlan FSF's
- At tryggja, at dreingir og gentur í felagnum fáa eins gott venjingartilboð
- At høvuðsungdómsvenjarin vegleiðir aðrar venjarar í felagnum
- At høvuðsungdómsvenjarin møtir á FSF felagsfundum um fótbóltsmenning (uml. 3-4 ferðir um árið)

### Samstarvið við fótbóltsmennaran merkir millum annað:

- Samstarv við høvuðsungdómsvenjaran samsvarandi treytunum í stjørnufótbóltsskipanini
- Vegleiðing / sparring til allar venjarar í felagnum
- Annað viðkomandi, eftir nærri avtalu

Fyri at fáa stuðul úr stjørnufótbólts-skipanini skal felagið hava skrivligan sáttmála við høvuðsungdómsvenjaran (høvuðsungdómsvenjararnar). Hesin sáttmálin skal í minsta lagi útgreina:

- Sáttmálatíðarskeiðið
- Lønarviðurskifti og arbeiðstíð
- Starvsinnihald og ábyrgdarøki

Eru spurningar ella ivamál um Stjørnu-fótbólts- og fótbóltsmennaraskipanina, er møguleiki at fáa nærri vegleiðing við at seta seg í samband við Pætur S. Clementsen, tekniskan stjóra, á teldupost: psc@football.fo.

## STUÐUL TIL VENJARAR HJÁ U15 OG U18 GENTUM

Hóast EM endaspælið fyri U17 gentur, ið skuldi verið í Føroyum í 2021, er avlýst, so er avgjørt, at stuðulsskipanin , har feløg kunnu søkja um stuðul til løn til venjarar hjá U15 og U16 gentum heldur fram í 2021.

Endamálið við hesi verkætlan er at menna venjingartilboðið til U15 og U18 gentur í feløgunum, umframt at skapa karmar til menning av leikarum til U17 landsliðið við gentum.

### Í 2021 ber til at søkja um fylgjandi stuðulsupphæddir:

- Kr. 30.000,00 til venjara hjá U15 gentum fyri 2021

- Kr. 30.000,00 til venjara hjá U18 gentum fyri 2021

Peningurin verður útgoldin til føløgini í august 2021. Felagið skal við útskrift frá TAKS prógva, at peningurin verður goldin til venjaran.

### Krøv til venjaran:

- Hevur galdandi UEFA B-licens, ella
- Hevur B-licens, sum ikki er í gildi, men tekur neyðugu impulstímarnar í 2021, so at licensurin kemur í gildi aftur
- Viðkomandi er ikki høvuðsungdóms-venjari í felagnum (undantøk kunnu gerast, t.d. hjá smærru feløgunum)

***Treytir til venjingartilboðið – felagið skal í minsta lagi bjóða:***

- Venjing til leikarar í aldursbólkinum 3 x vikuna (mars – okt'21)
- Vegleiðing til styrkivenjing til áhugaðar leikarar í aldursbólkinum
- Felagið hevur lið á heilum vølli (undantøk kunnu gerast, t.d. hjá smærru feløgunum)

## HATTRICK GRUNNURIN

**FSF hevur umvegis UEFA** stuðlað fleiri verkætlanum kring landið, tá talan hevur verið um at skifta vøllir og byggja felagshús. Seinasta árið er peningur settur av til betran av ljósviðurskiftum kring vøllirnar í Føroyum.

## NÁTTÚRUVAN-LUKKUGRUNNUR HJÁ UEFA

UEFA hevur frá 2020 sett á stovn ein grunn, ið hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til endurbygging av "fótbóltsfasilitetum", ið hava fingið stóran skaða í einari náttúruvanlukku, herundir ódnum, flóðaldum og skógvar-eldum.

Um feløg ynskja senda umsókn til Nátt-úruvanlukku grunnin hjá UEFA kunnu tit seta tykkum í samband við umsiting-ina hjá FSF. Tað er tó UEFA, ið tekur av-gerð um stuðul verður latin.

# LEIKARIN

Leikarin er sjálvur miðdepilin í einum fótbóltsfelagi. Skyldurnar hjá felagnum mótvegis leikararnum kunnu vera ymiskar, alt eftir um talan er um áhuga- ella yrkisleikara.



**Flytingar-gluggin 2021**

- Letur upp: 8. januar
- Letur aftur: 15. mars

- Letur upp: 15. juni
- Letur aftur: 12. juli

## LEIKARALOYVI

**Allir leikarar felagsins** skulu vera skrásettir hjá FSF. Skrásetingin fer fram í skrásetingarskipanini hjá FSF, Comet (les meira um Comet á síðu 37). Einans leikarar, ið hava leikaraloyvi skrásett hjá felagnum, kunnu leika dystir fyri felagið.

Um ein leikari flytir felag, er neyðugt at loyvið eisini verður flutt. Er talan er um flyting millum tvey føroysk feløg fer flytingin fram umvegis Comet skipanina, meðan flyting av leikarum millum lond fer fram umvegis TMS skipanina hjá FIFA.

Leikarar, ið eru 16 ár ella eldri kunnu einast flyta leikaraloyvið í tíðarskeiðinum, tá flytigargluggin er opin. Aðrir leikarar kunnu flyta leikaraloyvið fram til 31. august í inniverandi ári.

*TMS skipanin er leikaraskipanin hjá FIFA. Øll feløg skulu at hava ein skrásettan TMS brúkara, ið hevur luttikið á viðkomandi skeiði hjá FSF og hevur atgongd til TMS skipanina hjá FIFA.*

Eru spurningar ella ivamál um, hvussu eitt leikaraloyvi verður skrásett ella flutt, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við skrivstovuna hjá FSF á 351979 ella fsf@fsf.fo



# LIMAGJALD

Limir felagsins gjalda limagjald í felagnum.

**Viðtøkur felagsins áseta**, hvussu limagjaldið í einum felagi skal vera ásett. Vanliga er tað aðalfundurin, ið skal taka endaliga avgerð um ásetan av limagjaldinum. Hetta verður tó gjørt eftir tilmæli frá starvsnevndini, ið hevur besta kunnleika til og ábyrgd av fíggjarstøðu felagsins.

Tað er tó týdningarmikið, tá starvsnevndin ásetir limagjaldið, at hugt verður gjølla eftir, hvørjar útreiðslur felagið hevur av ymsu bólkunum í felagnum.

Um hugt verður burtur frá rakstrinum av liðum í Betri deildini, men bert eftir barna- og ungdómsliðum (og lið sum t.d. Old Boys), so eru framvegis nógvar útreiðslur, ið skulu rindast. Hesar eru eitt nú tilmeldingargjøld, el, hiti og viðlíkahald av felagshúsinum, leikbúnar, venjingarútgerð og samsýning til venjarar.

Samstundis skal limagjaldið ikki setast so høgt, at limir setast aftur av hesum. Tað er tí ein torfør meting at finna fram til rætta talið. Tað kann tí eisini vera hent, at man sundurskilur aldursbólkarnar í felagnum og ásettur ymisk gjøld, alt eftir hvat kostnaðurin er av aldursbólkinum, tí eitt U17 liðið er dýrari í rakstri enn eitt U7 lið.

Fyri at halda limagjaldinum niðri verður vanliga eisini skipað fyri inntøkugevandi tiltøkum.

Tað er sjálvsagt eisini av avgerandi týdningi, at limagjaldið verður kravt inn.

# COMET PLAY

**Frá kappingarbyrjan** í 2021 bjóðar FSF feløgunum ein nýggjan plattform, ið skal lætta um skráseting av leikarum, limum v.m. Í nýggja plattforminum Comet PLAY er møguligt at skráseta spælarar og gjalda limagjald umvegis skipanina, ið fer beinleiðis á konto hjá feløgunum. Hetta er ein plattformur til feløgini, sum feløgini sjálvi stýra, og sum samstundis er knýtt at Comet.




## Tey tvey modulini í PLAY, SKRÁSETING og SØLA/GJALDING geva feløgunum atgongd til:

- Skráseting av limum. Feløgini kunnu markera limir, ið tey ynskja at synkronisera við Comet sum skrásettir spælarar
- Selja og innkrevja gjald av øllum slagi umvegis plattformin. Limagjald, sølu av blusum og øðrum merchandise.

FSF viðmælir øllum feløgum at nýta PLAY og tí hevur FSF valt at gjalda fyri platformin og veitir hjálp til umsóknir til stovnan av NETS avtalum og Quickpay.

*Eru spurningar ella ivamál um Comet Play er møguleiki at fáa nærri vegleiðing við at seta seg í samband við Ásu Klakkstein Kalsø, á teldupost: asa@football.fo*

# TRYGGING

**Ítróttarsamband Føroya** hevur eina felags vanlukkutrygging, ið er galdandi fyri allar íðkarar, ið eru limir í einum ítróttarfelagi. Tryggingin umfatar tó ikki yrkisleikarar. Har er tó ein treyt, at felagið hevur teknað lógarkravda arbeiðsskaðatrygging fyri leikaran.

Tryggingin tekur við, um talan er um vanlukkutilburð, sum merkir “ein brádlig hending, ið elvir til likamsskaða”. Talan skal vera um ein tilburð, ið er farin fram undir ítróttakapping ella venjing.

Tryggingin tekur bert við í Føroyum. Tað er tí týdningarmikið, at feløg kanna síni tryggingarviðurskifti, um tey fara uttanlands í sambandi við kappingar ella venjingarlegur.

Fráboðan av skaða fer fram við at fylla út vanlukkufráboðanarskjal, ið er tøkt á heimasíðuni hjá ÍSF, www.isf.fo, og skal hetta síðani latast inn til ÍSF við neyðugum fylgiskjølum.

Tað kann tó verða neyðugt hjá einum felagi at hava aðrar tryggingar, ið fevna um m.a. starvsfólk, ognir og ferðir. Fótbóltssambandið metir, at tað er av stórum týdningin, at feløgini hava teirra trygginarviðurskifti í lagi. Tí verður heitt á øll feløg, um regluliga at hava eftirlit við sínum tryggingum og kanna, hvørjir tryggingarmøguleikar eru.

Møguleiki er at lesa meira um felags vanlukkutryggingina hjá Ítróttarsambandi Føroya á heimasíðu teirra www.isf.fo



# YRKISLEIKARAR

**Ein leikari** skal hava yrkisleikarasáttmála, um hesin skal luttaka í dysti í bestu deildini hjá monnum.[1]

Tá felag skrivar sáttmála við leikara, skal Standard Yrkisleikarasáttmálin hjá FSF nýtast, og hesin skal skrásetast í Comet skipanini. Hetta er galdandi fyri allar yrkisleikara, bæði um felagið spælir í bestu deildini ella í lægri deildum.

FSF Standard Yrkisleikarasáttmálin er tøkur á heimasíðuni hjá FSF á enskum og føroyskum. Um tit hava spurningar í samband við sáttmálaviðurskifti, eru tit altíð vælkomin at seta tykkum í samband við løgfrøðingin hjá FSF, Ronnie Háfoss.

1 *Leikari, ið ikki áður hevur havt sáttmála kann leika ein dyst í Betri deildini hjá monnum uttan at hava sáttmála.*

# ÚTLENDSKIR YRKISLEIKARAR

**Ríkisborgarar úr londum uttanfyri** Norðurlond skulu hava arbeiðs- og uppihaldsloyvi fyri at arbeiða í Føroyum. Hetta er eisini galdandi, tá talan er um ítróttarfólk (venjara og/ella leikarar).

Táumsóknumarbeiðs-oguppihaldsloyvi skal viðgerast verður skilt í millum, um talan er um fulltíðarsetan ella parttíðarsetan. Udlændingestyrelsen (www.nyidanmark.dk) viðgerð øll mál um arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Udlændingestyrelsen hevur sett sær fyri, at hesi mál kunnu verða avgreidd innan uml. 1 mánaða, tó treytað av, at umsóknin (setanaravtalan íroknað) er fullfíggjað.

Er talan um parttíðarsetan er møguleiki at søkja um arbeiðs- og uppihaldsloyvi sambært treytinum í ítóttaravtaluni. Tað er tí sjálvsagt ein fortreyt, at talan er um parttíðarsetan.

Ein fortreyt fyri at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi sambært ítróttaavtaluni er, at eitt føroyskt ítróttafelag rindar løn til ítróttafólkið uppá í minsta lagi kr. 12.067,72 (frá 1. mai 2021 er upphæddin kr. 12.218,24) um mánaðin (altíð umframt frítíðarløn/frítíðarískoyti).

Møguleiki er hjá ítróttarfólki at hava annað arbeiði aftrat ítróttinum. Tað er tó ikki loyvt at forvinna meira kr. 11.139,43 (frá 1. Mai 2021 er upphæddin kr. 11.278,37) um mánaðin í arbeiðinum, ið er aftrat ítróttinum.

Arbeiðs- og uppihaldsloyvi, ið verður latið eftir ítróttaravtaluni, kann bert vera galdandi í eitt ár.

Er talan um fulltíðarsetan, skal søkjast um arbeiðs- og uppihaldsloyvi sambært vanligu reglunum.

Umsóknarskjal til arbeiðs- og uppihaldsloyvi til bæði part- og fulltíðarsetan er at finna á heimasíðuni hjá Útlendingastovuni: https://www.utlendingastovan.fo/fo/arbeidsloyvi/itrottarloyvi/umsokn/

Fyri leikarar, ið hava tørv á arbeiðs- og uppihaldsloyvi, kann leikaraloyvi ikki skrásetast hjá FSF, fyrr enn leikarin hevur fingið arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Umsókn loyvisbræv til útlendskan leikara skal latast inn til FSF.

### Í umsóknini skal upplýsast og leggjast við:

- Navn leikarans,
- Føðidagur,
- Bústaður hjá leikara,
- Bústaður á útlendska felagnum hann leikar fyri,
- Avrit av gildugum arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum, og
- Váttan frá føroyska fólkayvirlitinum um at leikarin er skrásettur í føroyska fólkayvirlitinum sum fluttur til Føroya.

Leggjast skal til merkis, at loyvisbrœv til útlendskan leikara fer sjálvvirkandi úr gildi sama dag, sum arbeiðs- og uppihaldsloyvi gongur út.



# UPPALINGARPENGAR

Endurgjald fyri venjing og útbúgving av ungum leikarum.

**Leikarareglugerðin** ásetir, hvørji rættindi til endurgjald fyri venjing og útbúgving (vanliga kallað uppalingarpengar) eitt felag hevur, tá ein leikari skiftur felag ella skrivar undir sín fyrsta yrkissáttmála. Leikarareglugerðin fevnir bert um skifti millum føroysk feløg.

Endamálið við hesum reglum er at tryggja støðug og góð kappingarviðurskifti, sum taka rímulig atlit til, at tað kann vera tørvur á leikaraskiftum, sum eisini liggur uttan fyri tað, sum kann vera avtalað millum felag og leikara og at samsýna feløgum, sum gjøgnum ungdómsarbeiði teirra hava verið við til at venja og útbúgva ungar fótbóltsleikarar.

***Nær skal endurgjald fyri venjing og útbúgving rindast?***

Tá ein leikari yngri enn 23 ár skrivar undir sín fyrsta sáttmála sum yrkisleikari, hevur felagið, ið hann fer frá, og onnur feløg, ið leikarin hevur leikt við millum 12 og 21 ára aldur, rætt til endurgjald fyri venjing og útbúgving.

***Hvat skal rindast í endurgjald fyri venjing og útbúgving?***

Tað er ásett í §§ 26 og 27 í leikarareglugerðini, hvussu upphæddin skal roknast, og hvørjar upphæddir skulu nýtast í roknistykinum:

- Fyri árini, tá leikarin var 12 – 15 ár verður kr. 5.000,00 fyri hvørt ár.
- Fyri árini, tá leikarin var fylti 16 ár, verður upphæddin ásett alt eftir, hvørja deild felagið, ið leikarin fer til, hevur lið í. Talan er um tríggjar ymsar upphæddir:
    - Fer leikarin til felag við liði í Betri Deildini er upphæddin kr. 5.000,00 fyri hvørt árið,
    - Fer leikarin til felag við liði í 1. Deild er upphæddin kr. 3.000,00 fyri hvørt árið,
    - Fer leikarin til felag við liði í 2. Deild er upphæddin kr. 1.000,00 fyri hvørt árið.

Endurgjaldið verður roknað fram til og við kappingarárið, tá leikarin fylti 21 ár (tvs. at eitt felag kann í mesta lagi fáa endurgjald fyri 10 ár).

### *Kann rætturin til endurgjald detta burtur?*

Tað eru viðurskifti, ið kunnu gera, at eitt felag kann missa rættin til at krevja endurgjald fyri útbúgving og venjing. Hetta er galdandi um:

- Eitt felag uttan sakliga orsøk (just cause) hevur sagt upp sáttmálan við yrkisleikara, ið er undir 21 ár (§ 23, stk. 1)
- Minni enn tveir mánaðir eru eftir av sáttmálatíðarskeiðinum hjá einum yrkisleikara, ið er undir 21 ár og felagið ikki hevur bjóðað leikaranum nýggjan sáttmála á sama lønarstøði (sáttmálahavandi felagið skal kunnu prógva at hava givið leikaranum skrivligt tilboð um nýggjan sáttmála á sama lønarstøði (§ 23, stk. 2) ella
- Um leikari í sambandi við flytingina aftur gerst áhugaleikari (§ 23, stk. 3)

### *Nær skal endurgjaldið rindast?*

Felagið, ið skal rinda endurgjald, hevur skyldu til at rinda hetta í seinasta lagi 30 dagar eftir, at yrkisleikarasáttmálin er undirskrivaður. Hetta merkir samstundis eisini, at tað er ikki ein treyt, at felagið, ið hevur rætt til endurgjald, hevur gjørt hetta galdandi.

### *Hvat um leikarin skiftir til eitt útlendskt felag?*

Líknandi ásetingar eru í *FIFA Regulations on the Status and Transfers of Player*, ið áseta kravið um endurgjald fyri útbugving og venjing, tá leikarin fer til eitt útlendskt felag.

Hesar reglurnar vera tó ikki útgreinaðar nærri í hesari vegleiðing. Feløg, ið hava tørv á vegleiðing um hetta, verða biðin um at seta seg í samband við skrivstovuna hjá Fótbóltssambandinum.

## Dømi 1

19 ára gamal leikari skiftur frá felag A til felag B, ið hevur lið í 1. deild, og her skrivar leikarin undir sín fyrsta yrkisleikarasáttmála. Leikari spældi í einum triðja felagi (felag C) fram til endan av tí kappingarárinum, tá hann fylti 14 ár.

*Hvussu skal endurgjaldsupphæddin, tá roknast millum feløgini?*

**Felag A**
1 ár á kr. 5.000,00 (árið tá leikarin var 15 ár) = 5.000,00 kr.
4 ár á kr. 3.000,00 (árini, ið leikarin var 16 – 19 ár) = 16.000,00 kr.
***Tilsamans kr.21.000,00***

**Felag C**
3 ár á kr. 5.000,00 (árini, ið leikarin var 12 – 14 ár) = 15.000,00 kr.
***Tilsamans kr. 15.000,00***

*Felag B skal tískil samanlagt rinda 36.000,00 kr. til feløgini A og C*

## Dømi 2

Tvey ár seinni flytur leikarin víðari til felag D, ið hevur lið í Betri Deildini. Leikarin er tá 21 ára gamal. Felag B hevur frammanundan skrivliga bjóðað leikarnum at longja sáttmála undir somu treytum.

*Endurgjalds upphæddin skal tá roknast soleiðis:*

**Felag A**
Felagið hevur ikki rætt til endurgjald, tí hetta er longu goldið í dømi 1

**Felag B**
2 ár á kr. 5.000,00 (árini, tá leikarin var 20 – 21 ár) = 10.000,00 kr.
***Tilsamans kr. 10.000,00***

**Felag C**
Felagið hevur ikki rætt til endurgjald, tí hetta er longu goldið í dømi 1.

**Felag D** skal tí einans rinda endurgjald fyri venjing og útbúgving til felag B fyri tey tvey árini, ið hann hevur leikt har, aftaná hann skifti frá felag A

## Dømi 3

Ein 20 ára gamal yrkisleikari skiftur til felag A frá felag B, har hann hevur spælt síðani hann var 10 ár. Tað hevur verið nakað av útskifting í nevndini í felag B seinastu tíðina, tí hevur felagið gloymt at bjóða leikarnum nýggjan sáttmála, tí hansara sáttmáli fer at ganga út um 2 vikur. Tað er tó ongin ivi um, at felagið hevur ætlanir um, at leikarin skal halda fram.

*Hvørja upphædd hevur felag B rætt til sum endurgjald fyri útbúgving og venjing?*

*Av tí at felag B ikki hevur bjóðað leikarnum nýggjan sáttmála undir somu treytum, hevur felagið mist rættin til at krevja endurgjald fyri útbúgving og venjing.*

# MILLUMMENN

**Reglurnar um nýtslu** av millummonnum (sum í FIFA høpi verða nevndir "*intermediaries*") í samband við leikaraskifti eru ásettar í *FSF Regulations Governing Intermediaries*, sum komu í gildi 15. februar 2016.

Hesar reglur áseta, at leikarar og fótbóltsfeløg, ið ynskja at lata seg umboða av einum millummanni í sambandi við samráðingar um og gerð av leikarasáttmála, lánisáttmála ella avtalu um flyting av leikara til eitt føroyskt fótbóltsfelag hava skyldu til einans at nýta millummenn, ið frammanundan eru skrásettir hjá FSF, ella at senda inn umsókn um skráseting til FSF í seinasta lagi, tá ið avtalan um umboðan verður undirskrivað av pørtunum.

Á heimasíðu FSF´s undir: "Lógir og reglur" > "Millummenn", ber til at taka niður nevndu reglugerð um millummenn, og har er eisini eitt dagført yvirlit yvir FSF skrásettar millummenn, umframt standard umsóknarskjøl viðvíkjandi skráseting av millummanni og umboðanaravtalum.

Tá leikari letur seg umboða av einum millummanni, hevur leikarin skyldu til at senda inn eina umboðanaravtalu til FSF, sum leikarin og millummaðurin hava undirskrivað.

Tá fótbóltsfelagið letur seg umboða av einum millummanni viðvíkjandi leikara sum kemur til fótbóltsfelagið úr útlandinum ella úr frá øðrum fótbóltsfelagi í Føroyum hevur fótbóltsfelagið skyldu til at senda inn eina umboðanaravtalu til FSF, sum fótbóltsfelagið og millummaðurin hava undirskrivað.

Bæði fótbóltsfelag, leikari og millummenn kunnu verða revsað fyri brot á hesar reglur.

---

***Skyldur hjá millummanninum:***

- at lata seg skráseta seg hjá FSF
- at fylgja øllum reglum og ásetingum hjá FSF, UEFA og FIFA
- at tryggja at avtalur, ið hann er partur av, fylgja reglum og ásetingum hjá FSF, UEFA og FIFA
- at hann ikki skal seta seg í samband við ein leikara, ið er sáttmálabundin við tí endamáli at fáa hendan at siga upp sáttmála sín við felagið ella á annan hátt at mishalda skyldur sínar sambært sáttmálanum
- at bæði áðrenn og aftaná, at umboðsavtala verður undirskrivað, at geva leikaranum ella fótbóltsfelagnum boð um møguligt áhugasamanfall
- at bert umboða annan partin í samráðingarmálum og tryggja, at onki samanfall er í áhugamálum hansara. Hetta er tó ikki galdandi, um bæði leikari og fótbóltsfelag skrivliga vátta, at tey ynskja at verða umboðað av sama millummanni. Hendan avtalan skal innihalda upplýsingar um, hvussu samsýningin til millummannin verður goldin, og hendan avtalan skal vera send til FSF
- at lata inn øll skjøl, ið kunnu verða umbiðin av FSF, UEFA ella FIFA
- at tryggja, at navn hansara og undirskrift framgongur í yrkisleikarasáttmálanum, láni- ella flytingaravtaluni
- at hann ikki átekur sær fleiri uppgávur, hvørki fyri leikarar ella fótbóltsfeløg, enn hann megnar
- at goyma og kunna skjalprógva allar avtalur, ið hann hevur verið partur av, herundir hvørja samsýning hann hevur móttikið, og hvør hevur rindað samsýningina

- at kunna FSF um, hvør er í starvi hjá millummanninum, og hvørjir partaeigarar og nevndarlimir eru í felagnum (um millummaðurin hevur skipað sítt millummanna-virksemi í einum felagi)
- at tryggja, at starvsfólk, ið ikki eru skrásett sum millummenn, bert taka sær av fyrisitingarligum upp-gávum og ikki eru partur av sam-ráðingum ella á annan hátt um-boða fótbóltsfeløg ella leikarar
- at lata inn roknskap sambært galdandi lóggávu
- at, um hetta verður umbiðið frá fótbóltsfelag ella leikara, kunna senda faktura, ið vísur kostnaðin fyri umboðan og allar aðrar út-reiðslur, ið eru tengdar at hesum
- at, um hetta verður umbiðið frá FSF, UEFA ella FIFA, kunna skjalprógva allar fíggjarligar útreiðslur, ið eru tengdar at einum ávísum máli

***Skyldur leikarans:***

- at tryggja sær, at áðrenn um-boðsavtala verður gjørd, at einki áhugasamanfall er
- at tryggja, at umboðsavtalan er undirskrivað og send til FSF
- at tryggja, at um ein millummaður hevur verið partur av samráðingunum, skal navn hansara og undirskrift fram-ganga av yrkisleikarasáttmálanum
- at tryggja, at um broytingar verða gjørdar í avtaluni við millum-mannin, ella um nýggj umboðs-avtala verður gjørd, skal FSF hava avrit av hesum innan 5 dagar
- at lata inn onnur skjøl innan rímiliga tíð eftir umbøn frá FSF, UEFA ella FIFA

***Skyldur fótbóltsfelagsins:***

- at tryggja, at einki áhugasamanfall er áðrenn umboðsavtala verður gjørd
- at tryggja, at umboðsavtalan er undirskrivað og latin inn til FSF
- at tryggja, at um ein millummaður hevur verið partur av samráðingunum, skal navn hansara og undirskrift framganga av yrkisleikara- ella flytingarsáttmálanum
- at tryggja, at um broytingar verða gjørdar í avtaluni við millummannin, ella um nýggj umboðsavtala verður gjørd, skal FSF hava avrit av hesum innan 5 dagar
- at lata inn onnur skjøl innan rímiliga tíð eftir umbøn frá FSF, UEFA ella FIFA
- at um fótbóltsfelagið rindar eina upphædd til eitt annað fótbóltsfelag í sambandi við leikaraskifti, at tryggja, at hendan upphæddin verður goldin beinleiðis til viðkomandi fótbóltsfelag

Fótbóltsfeløg, leikarar og/ella millum-menn, ið ikki yvirhalda ásetingarnar um millummenn í *FSF Regulations Governing Intermediaries,* kunnu fáa álagt eina revsing av FSF fyri staðfest brot á reglugerðina.

Eru spurningar ella ivamál í sam-bandi við nýtslu av millummonnum, er møguleiki at fáa nærri vegleiðing við at seta seg í samband við Ronnie Háfoss, loyvisstjóra, á teldupost: ronnie@fsf.fo

# VENJARIN

## KRØV TIL VENJARAPRÓGV

Loyvisskipanin hjá FSF (les meira um loysvisskipanina á s. 30) inniheldur nakrar treytir um, hvat venjaraprógv, ið venjarar í ymsu deildinum skulu hava.

| DEILD | VENJARAPRÓGV |
|---|---|
| Høvuðsvenjari: Betri Deildin Menn | A venjaraprógv |
| Hjálparvenjari: Betri Deildin Menn | B venjaraprógv |
| Høvuðsvenjari: Betri Deildin Kvinnur | B venjaraprógv |
| Høvuðsvenjari: 1. Deild menn | B venjaraprógv |

### Betri Deildin menn:

#### Høvuðsvenjarin

- **a)** hava gildugt FSF A venjaraprógv; ella
- **b)** verða innskrivaður á FSF A venjaraútbúgvingini og hava lokið í minsta lagi helmingin av venjaraskeiðnum; ella
- **c)** hava annað gildugt venjaraprógv, ið er á samsvarandi støði sum FSF A venjaraprógv.

#### Hjálparvenjarin

- **a)** hava gildugt FSF B venjaraprógv; ella
- **b)** verða innskrivaður á FSF B venjaraútbúgvingini og hava lokið í minsta lagi helmingin av venjaraskeiðnum; ella
- **c)** hava annað gildugt venjaraprógv, ið er á samsvarandi støði sum FSF B venjaraprógv.

### 1. Deild menn:

- **d)** hava gildugt FSF B venjaraprógv; ella
- **e)** verða innskrivaður á FSF B venjaraútbúgvingini og hava lokið í minsta lagi helmingin av venjaraskeiðnum; ella
- **f)** hava annað gildugt venjaraprógv, ið er á samsvarandi støði sum FSF B venjaraprógv.

### Betri Deildin kvinnur:

- **a)** hava gildugt FSF B venjaraprógv; ella
- **b)** verða innskrivaður á FSF B venjaraútbúgvingini og hava lokið í minsta lagi helmingin av venjaraskeiðnum; ella
- **c)** hava annað gildugt venjaraprógv, ið er á samsvarandi støði sum FSF B venjaraprógv.

Tey feløg, ið søkja um luttøkuloyvi til eina ella fleiri av fylgjandi deildum: Betri deildin menn, Betri deildin kvinnur og/ella 1. deild menn, skulu hava ein høvuðsungdómsvenjara við fylgjandi prógvi:

- **a)** hava gildugt FSF B venjaraprógv; ella
- **b)** verða innskrivaður á FSF B venjaraútbúgvingini og hava lokið í minsta lagi helmingin av venjaraskeiðnum; ella
- **c)** hava annað gildugt venjaraprógv, ið er á samsvarandi støði sum FSF B venjaraprógv.

Loyvisreglugerðin ásetir eisini nøkur krøv til ungdómsvenjarar í feløgunum, ið søkja um luttøkuloyvi. Hetta er nærri útgreinað í grein 27 í loyvisreglugerðini og article 39 í loyvisreglugerðini fyri luttøku í altjóða kappingum (The Faroe Islands Football Association Club Licensing Regulations, edition 2021).

Onnur krøv til venjaraprógv kunnu vera ásett í millum annað stuðulsskipanum hjá FSF, har eitt nærri ásett krav skal vera lokið, fyri at felagið kann fáa stuðul.

## VENJARASKEIÐ

Fyri at tryggja eitt høgt venjarastøði og góðsku í fótbóltsvenjingini, skipar FSF á hvørjum ári fyri fleiri venjaraskeiðum. Venjaraútbúgving hjá FSF er skipað í tveimum stigum: B og A venjaraskeið. Aftrat hesum verður eisini skipað fyri málmansvenjaraskeiðum (M1 og M2) og impulsskeiðum, ið hava ymisk viðkomandi evni.

| B VENJARAPRÓGV | | | |
|---|---|---|---|
| **B1** ( 15 tímar ) | **B2** ( 40 tímar ) | **B3** ( 50 tímar ) | **B4** ( 60 tímar ) |

↓

| A VENJARAPRÓGV |
|---|
| ( 300 tímar ) |

Sum nevnt frammanundan er tað í ymsum deildum krøv um, hvat venjaraprógv, ið viðkomandi skal hava.

Tað er týdningarmikið, at bæði venjari og feløg hava í huga, at venjaraprógv eru bert galdandi í eitt ávíst tíðarskeið. Fyri at venjaraprógv ikki skal fara út gildi er krav um, at venjarin regluliga luttekur á impulsskeiðum hjá Fótbóltssambandinum.

Venjaraprógv er galdandi í 3 ár og um hetta ikki skal fara úr gildi skal venjarin hava luttikið á impulsskeiðum hjá FSF (15 tímar), tá venjarin hevur luttikið á hesum skeiðum, verður venjaraprógvið longt 3 ár.

Eru spurningar ella ivamál um venjaraprógv og/ella venjaraskeið, er møguleiki at fáa nærri vegleiðing við at seta seg í samband við Pætur S. Clementsen, tekniskan stjóra, á teldupost: psc@fsf.fo

### B1 skeið í felagnum

Sum nakað nýtt er møguleiki fyri at skipa fyri B1 skeið úti í felagnum, har tíðarætlanin verður lagt tillagað tykkara virksemi.

# VENJARASÁTTMÁLI

Fyri venjarar í **Betri deildini hjá monnum og kvinnum** og **1. deild hjá monnum** er krav, at FSF standard venjarasáttmálin skal nýtast, tá sáttmáli verður gjørdur (hendan reglan kom í gildi 3. oktober 2019. Venjarasáttmálar, ið eru gjørdir áðrenn hesa dagfesting verða verandi í gildi til hesir ganga út ella verða uppsagdir).

FSF standard venjarasáttmálin kann takast niður á føroyskum og enskum máli á heimasíðuni hjá FSF undir ”FSF” > ”Oyðubløð”.

Viðmælt verður, at feløg eisini brúka FSF standard venjarasáttmálan, tá avtala verður gjørd við aðrar venjarar enn teir, ið eru settir til áðurnevndu deildir.

# ÍTRÓTTA-FRÁDRÁTTUR

Ítróttafrádráttur er ein upphædd, ið venjarar (ella onnur hjálparfólk) skattafrítt kunnu fáa í samsýning frá einum (ella fleiri) ítróttarfeløgum. Ítróttafrádrátturin er hækkaður úr kr. 30.000,00 til kr. **50.000,00** um árið frá 1. januar 2020.

Fyri at samsýning skal kunna geva rætt til ítróttafrádrátt, skal felagið, sum rindar samsýningina, hava eitt v-tal til hjálparfólk hjá ítróttafeløgum.

### Taks hevur definerað hjálparfólk sum:

*Hjálparfólk eru øll onnur enn tey, sum útinna sjálvan ítrótt felagsins. Í einum bóltfelag eru tað øll onnur enn bóltspælararnir. Í einum róðrarfelag øll onnur enn rógvararnir o.s.fr. Hjálparfólk kunnu tískil vera leiðarar, venjarar, samskiparar, dómarar, bókhaldarar, nevndarlimir o.o.*

*Iðka tey samstundis ítrótt felagsins, missa tey tó ikki rættin til at fáa ítróttafrádrátt fyri tann partin, ið tey fáa samsýning fyri sum hjálparfólk.*

Tað er týdningarmikið at hava í huga, at fer upphæddin uppum tær kr. 50.000,00 (frítíðarløn er íroknað í hesari upphæddini, meðan eftirlønargjaldið ikki er íroknað), fellur rætturin til ítróttafrádráttin heilt burtur, íroknað av teimum upprunaligu kr. 50.000,00 kr.

Fær ein samsýning frá fleiri ítróttafeløgum, skulu allar samsýningar **samanlagt** ikki vera meira enn kr. 50.000,00 um árið. Tað er tó møguligt at fáa samsýning frá einum ítróttarfelagi sum ítróttarfráttur, og samstundis fáa løn frá einum øðrum ítróttarfelagi sum a-inntøku. Avgerandi er, at talan skal vera um tveir ella fleiri **ymiskar** arbeiðsgevarar.

Um felagið rindar samsýning til venjarar (ella onnur hjálparfólk) kann móttakarin ikki fáa aðrar skattafríar veitingar fyri sama virksemi, so sum endurgjald fyri ferðing, telefon og vistarhald.

Møguleiki er at lesa meira um ítróttarfrádráttin á heimasíðuni hjá TAKS: https://www.taks.fo/fo/borgari/fradrattur/itrottafradrattur/



# REVSIVÁTTAN

Øll feløg hava skyldu til at innheinta eina revsiváttan frá Føroya Landfúta, áðrenn tey seta fólk í starv, leingja eina starvssetan ella nýta fólk, sum skulu virka sum venjarar, liðleiðarar, hjálparfólk ella avloysarar hjá børnum undir 15 ár.

Revsiváttanin skal innihalda upplýsingar um, hvørt viðkomandi er dømdur fyri kynslig brotsverk (brot á kapittul 24 í revsilógini). Um revsiváttanin inniheldur upplýsingar um, at viðkomandi er dømdur fyri kynsligt brotsverk, hevur felagið skyldu til at tryggja, at viðkomandi ikki verður settur í starv hjá felagnum ella á annan hátt er knýttur at felagnum.

Øll feløg skulu einaferð um árið lata inn eina váttan til FSF, har felagið váttar at hava innheitað tær kravdu revsiváttanirnar. Hendan váttan skal vera latin inn í seinastalagi 1. februar á hvørjum ári.

Váttanarskjalið kann takast niður á á heimasíðuni hjá FSF undir ”FSF” > “Oyðubløð”.

Aganevndin tekur støðu til, hvørja revsing manglandi innlating hevur.

*Eru spurningar ella ivamál um venjarasáttmálan ella revsiváttan er møguleiki at fáa nærri vegleiðing, við at seta seg í samband við Ronnie Háfoss, loyvisstjóra, á teldupost: ronnie@fsf.fo*

# KAPPINGARÁRIÐ

## TILMELDING

Á hvørjum ári skulu feløg tilmelda tey lið, ið tey ynskja skulu taka lut í teimum kappingum, ið FSF skipar fyri. Hetta er galdandi fyri øll lið, líka frá Betri deildini til yngstu barnakappingarnar.

Tað kann sjálvandi vera torført hjá einum felagi at meta um, hvussu nógv lið felagið kemur at hava komandi kappingarárið, men tað er týdningarmikið, at feløgini gera mest møguligt fyri at tilmelda rætt tal av liðum frá byrjan. Hetta lættir nógv um hjá Fótbóltssambandinum, tí tá er ikki neyðugt at gera broytingar seinni í kappingarárinum.

Tað er samstundis týdningarmikið, at feløgini virða og fylgja teimum tilmeldingarfreistum, ið verða ásettar í sambandi við tilmelding av liðum til kappingarárið. Um tilmeldað verður ov seint verður eitt eyka gjald kravt.

### Loyvisskipanin

Feløg, sum luttaka í Betri deildini hjá monnum og kvinnum og 1. deild hjá monnum, skulu á hvørjum ári søkja um luttøkuloyvi hjá Fótbóltssambandinum. Aftrat hesum skulu feløgini, ið taka lut í altjóða kappingum hjá UEFA, søkja um luttøkuloyvi til hesar kappingar (t.e. UEFA Champions League, UEFA Europa League og UEFA Women's Champions League).

---

***Endamálið við loyvisskipanini er:***

- at virka fyri og áhaldandi at menna støði í øllum viðurskiftum, sum hava við føroyskan fótbólt at gera, og at tryggja, at serligur dentur verður lagdur á venjing og trivnað hjá ungum fótbóltsleikarum
- at tryggja, at limafeløg í Fótbóltssambandi Føroya hava eina nøktandi leiðslu og bygnað
- at tryggja, at limafeløg í Fótbóltssambandi Føroya hava hóskandi og tryggar vallarumstøður til leikarar, venjarar, dómarar, áskoðarar o.o.
- at betra um fíggjarliga førleikan hjá feløgum og økja um fíggjarliga gjøgnumskygnið og trúvirði
- at tryggja, at hóskandi dentur verður lagdur á at verja áognarar við at tryggja, at feløgini til ásettu tíð halda sínar fíggjarligu skyldur mótvegis sínum starvsfólkum, herundir leikarum, venjarum, sosialum- og skattamyndugleikum og øðrum feløgum

***Loyvisskipanin ásetir tær treytir, ið feløgini skulu lúka fyri at fáa luttøkuloyvið. Loyvisskipanin inniheldur millum annað treytir um:***

- at felagið hevur eina ungdómsmenningarætlan, ið lýkur nærri ásettar treytir
- at felagið hevur eitt nærri ásett ungdómsvirksemi við nøktandi tali av venjarum
- at felagið hevur hóskandi umstøður, herundir vallarumstøður, skrivstovu o.a.,
- at felagið hevur eitt nærri lýst tal av starvsfólki/venjarum (her undir samskipara, høvuðsundómsvenjara, fíggjarleiðara, lækna), ið samstundis eisini lúka nærri ásettar treytir um útbúgving
- at felagið onga gjaldkomna skuld hevur til almennar myndugleikar, starvsfólk og/ella onnur fótbóltsfeløg
- Krøv til løgfrøðiliga bygnaðin í felagnum og fíggjarstøðu felagsins (m.a. at felagið onga gjaldkomna skuld hevur til almennar myndugleikar, starvsfólk og/ella onnur fótbóltsfeløg

Um eitt felag hevur negativan eginpening, ella granskoðarin hevur ásett eina viðmerking ella tekur fyrivarni viðvíkjandi framhaldandi rakstrinum í felagnum, verður felagið álagt at lata inn eyka upplýsingar viðvíkjandi fíggjarstøðu felagsins.

Feløg, ið luttaka í altjóða kappingum, verða ásett fleiri treytir enn feløg, sum bert taka lut í føroyskum kappingum.

Nærri kunning um loyvisskipanin fæst hjá loyvisstjóranum hjá FSF, Ronnie Háfoss, samstundis sum reglugerðin hesum viðvíkjandi er at finna á heimasíðuni hjá FSF.

## Comet

Comet er skrásetingarskipanin, ið FSF brúkar til leikaraloyvi, dystir, kappingar og sáttmálar. Tað er tí týdningarmikið, at øll feløg hava atgongd til Comet og hava ein ella fleiri persónar, ið kenna skipanina, og tí kunnu hjálpa øðrum í felagnum.

Í sambandi við Cometskipanina er tað týdningarmikið at minnast til, at tað í síðsta enda altíð er felagið, ið hevur ábyrgd av, at ein leikari lógliga kann spæla. Tað kunnu vera viðurskifti, ið skipanin ikki tekur hædd fyri, ið gera at leikarin er ólógligur. Tí eigur felagið at hava greiðar reglur fyri, hvør hevur ábyrgd av at tryggja, at allir leikarar, ið spæla, eru lógligir.



Fótbóltssambandi skipar á hvørjum árið fyri skeiðið um, hvussu Comet skipanin verður brúkt.

## Kærur

Um eitt felag metir, at ein dystur ikki er farin fram í samsvar við kappingarreglurnar hjá FSF, hevur felagið møguleika at kæra hetta. Nærri útgreining av reglum í sambandi við kærur er at finna í Agareglugerðini, ið er at finna á heimasíðuni hjá Fótbóltssambandinum.

Kærur skulu sendast til aganevndina innan 5 dagar, eftir at brotið er framt, ella um talan er um ein úrskurð, 5 dagar eftir at úrskurðurin er komin til kunnleika hjá viðkomandi persóni ella felag.

Saman við kæruni skal fylgja eitt kærugjald á kr. 1.000,00, ið verður endurgoldið, um kærarin fær viðhald í kæru sínari.

---

# REGLUGERÐIR UM ANTI-DOPING OG MATCH FIXING

## Anti Doping

Altjóða fótbóltssamgongan FIFA hevur samtykt nýggja anti-doping reglugerð (FIFA ADR), sum tekur støði í World Anti-Doping Code hjá World Anti-Doping Agency (WADA), ið kom í gildi 1. januar 2021.

Hendan anto-doping reglugerðin hjá FIFA varð 7. januar 2021 sett í gildi í fyri føroyskan fótbólt.

FSF samstarvar við ÍSF um dopingeftirlit v.m., og fylgir teimum mannagongdum, sum ÍSF hevur ásett í hesum sambandi samsvarandi galdandi dopingreglugerð hjá ÍSF. Tó, um ósamsvar er ímillum anti-doping reglugerðina hjá ÍSF og FIFA, er FIFA antidoping reglugerðin galdandi.

Um leikarar taka heilivág, er týdningarmikið at kanna, um heilivágurin er loyvdur ella ikki (hóast heilivágur er útflýggjaður við recept, kann heilivágurin vera ólógligur.). Hetta verður gjørt umvegis heimasíðuna hjá Anti Doping Danmark: https://www.antidoping.dk/doping/medicin

Um ein leikari tekur heilivág, ið er á listanum yvir bannað evni, skal viðkomandi søkja um undantaksloyvi frá ÍSF, hetta kallast eitt TUE loyvi. Hendan umsóknin skal sendast til ÍSF, og viðgerðin kann taka upp til tvær vikur.

Vegleiðing til, hvussu søkt verður um TUE loyvi,
er at finna á heimasíðuni hjá Anti Doping Danmark:
https://www.antidoping.dk/doping/medicinsk-dispensation-tue



## Match Fixing

Tað er bannað fótbóltsleikarum, leiðarum, venjarum, dómarum ella leikaraumboðsmonnum at luttaka í avtalaðum spæli.

Hugtakið avtalað spæl verður nýtt um viðurskifti, tá úrslitið av einum fótbóltsdysti ella umstøðurnar í einum fótbóltsdysti (t.d. tal av hornaspark, brotsspark, fríspark ella tal av gulum ella reyðum kortum) eru avtalað frammanundan ella eru ávirkaði av øðrum áhugamálum enn ítróttarligum.

Øll innan føroyska fótbóltsheimin hava skyldu til beinanvegin at boða FSF frá, um tey fáa kunnleika til viðurskifti, ið hevur ella hevur havt sum endamál, at avtala ella ávirka úrslitið av einum fótbóltsdysti ella umstøðurnar í einum fótbóltsdysti.

*Fyri at fyribyrgja match fixing skipar FSF regluliga fyri skeiðum, har feløg og leikarar verða kunnaði um match fixing og hvat tey hava loyvi til í samband við vedding, og hvat tey ikki hava loyvi til. Um eitt felag ynskir at skipa fyri kunnandi fundi um match fixing kann hetta gerast við at seta seg í samband við Ronnie Háfoss, loyvisstjóra, á teldupost: ronnie@fsf.fo*

# DÓMARAR OG DØMING

Dómarar eru ein týdningarmikil partur av fótbóltsfamiljuni, tí ongin fótbóltsdystur kann vera leiktur uttan dómarar.

Tað er tí sera týdningarmikið, at feløgini saman við Fótbóltssambandinum royna at rekrutera fleiri dómarar og menna teir verandi. FSF hevur seinastu árini havt stórt fokus á at seta fleiri dómarar við, samstundis sum tað serliga hevur verið fokus á at fáa fleiri kvinnuligar dómarar.

Dómaranevndin hevur ásett, at hvørt felag skal hava fylgjandi tal av dómarum **tøkar:**

- 4 dómarar, um felagið hevur lið í Betri deildini hjá monnum
- 3 dómarar, um felagið hevur lið í 1. deild hjá monnum
- 1 dómara, um felagið hevur lið í 2. deild hjá monnum
- 1 dómara pr. lið, ið felagið hevur í U21 deildini
- 1 dómara, um felagið hevur lið í Betri deildini hjá kvinnum

Tó skulu øll feløg, ið hava lið í einum av deildunum nevndum omanfyri, hava í minsta lagi 3 dómarar tøkar.

FSF kann lata eina upphædd fyri hvønn tøkan dómara hjá FSF – um felagið líkur minsta kravið. Hinvegin kann FSF eisini krevja inn bøtur fyri manglandi tal av tøkum dómarum, um felagið ikki lýkur minstu krøvini, ið eru nevnd omanfyri.

***Ein dómari er at rokna sum tøkur, tá fylgjandi treytir eru loknar:***

- Viðkomandi skal hava FSF-dómaraprógv
- Tøkur merkir at kunna døma í teirri deild, FSF setur viðkomandi at døma í inniverandi kappingarári
- Avtala kann gerast við dómaraleiðaran hjá FSF um frítøku fyri døming eitt ávíst tíðarskeið t.d. vegna feriu, skaða, arbeið o.a.
- Um dómari av sínum eintingum, uttan haldgóða grund, sí punkt 3, gevst at døma uttan avtalu við dómaraleiðaran hjá FSF, verður viðkomandi ikki mettur at hava verið tøkur alt kappingarárið

**Dømi 1**

Um besta liðið hjá felagnum leikar í Betri deildini hjá monnum skal felagið tilmelda 4 dómarar, um næstbesta liðið leikar í 1. deild skal felagið tilmelda 3 dómarar afturat og so 1 dómara fyri hvørt tilmeldað lið í 2. deild, U21 deildini og Betri deildini hjá kvinnum.

**Dømi 2**

Um besta liðið hjá felagnum leikar í 1. deild skal felagið tilmelda 3 dómarar, og so 1 afturat fyri hvørt tilmeldað lið í 2. deild, U21 deildini og Betri deildini hjá kvinnum.

Eru spurningar ella ivamál viðvíkjandi døming og dómaraviðurskiftum sum heild, er møguleiki at seta seg í samband við dómaraleiðaran hjá Fótbóltssambandinum, Lassin Isaksen, á lassin@fsf.fo

## Dómaraskeið

Fótbóltssambandið skipar á hvørjum ári fyri ymsum dómaraskeiðum. Miðað verður eftir at halda dómaraskeið kring landið í samstarvi við feløg. Fótbóltssambandið er eisini farið undir at skipa dómaraskeið í samstarvi við kvøldskúlar og miðjar eftir at hava líknandi skeið í samstarvi við miðnámsskúlarnar kring landið. Luttakari skal vera 15 ár ella eldri.

Dómaraútbúgvingin hjá FSF er skipað í fýra stigum: FSF-dómari, C-dómari, B-dómari og síðani A-dómari. Harafturat er eitt fyrireikingarskeið kalla Dómarin. Luttakararnir fáa innlit í fótbóltslógina, og seinni kunnu luttakararnir taka prógv sum FSF-dómari.

Eisini eru nakrir dómaraúrmælingar, sum eru teir dómarar, ið døma á hægsta stigi í Føroyum. Fyri at gerast dómaraúrmælingur skal viðkomandi hava lokið øll fýra stigini. Fyri at døma í Betri deildini hjá monnum er krav, at viðkomandi er úrmælingur.



## Dómaraskamskipari

Viðmælt verður øllum feløgum at hava ein dómarasamskipara, ið hevur ábyrgdina av øllum, ið viðvíkur døming í felagnum. Hesar uppgávur kunnu millum annað vera:

- Ásetan av dómarum til barna- og ungdómsdystir
- Tilmelding av dómarum til skeið
- Vera bindilið millum nevnd og dómarar
- Rekrutera nýggjar dómarar og skapar góðar umstøður hjá verandi dómarum

At vera dómari kann til tíðir kennast heldur einsligt. Tað er tí týdningarmikið, at feløgini hava fokus á at skapa eitt gott dómaraumhvørvið, ið samstundis er við til at tryggja, at dómarar gerast ein partur av felagsskapinum.

Um felagið hevur ein dómarasamskipara er natúrligt, at hesin hevur uppgávu at skapa eitt dómaraumhvørvi í felagnum. Hetta kann millum annað gerast við at skipa fyri innanhýsis skeiðum og temakvøldum fyri dómarar. Um tað er torført at fáa gongd á eitt slíkt umhvørvi (tildømis tí felagið hevur fáar dómarar), er eisini møguligt at fleiri feløg í nærumhvørvinum gera hetta í felag, t.d. øll feløgini í Eysturoynni.

Dómararnir hjá felagnum kunnu eisini brúkast til at kunna leikarar um fótbóltslógina og dagføringar í hesum.



## Hanus Johannesen, *nevndarlimur í B71*

**Vit valdu at seta ein persón sum dómarasamskipara í felagnum. Dómarar eru oftani ein gloymdur partur av felagnum, og tí mettu vit, at tað var týdningarmikið, at teir høvdu ein ábyrgdarpersón í felagnum.**

*Ein av týdningarmiklastu uppgávunum hjá dómarasamskiparanum hevur verið at eggja (serliga ungum) til at royna seg sum dómarar og fara undir at taka skeið sum FSF dómari. Hetta hevur eydnast væl, og hevur B71 seinastu árini haft eina stóra framgongd í tali av dómarum. Hóast vit í B71 kanska eru eitt av minnu fótbóltsfeløgunum, eru vit sera væl umboðað á dómarasíðuni.*

*Dómarasamskiparin hevur eisini sum uppgávu at seta dómarar til ungdómsdystir, og saman við Fótbóltssambandinum at skipa fyri dómaraskeiði í felagnum.*

## Felagsstev og stevnan

Fótbóltssambandið kallar á hvørjum ári inn til ein felagsstev fund. Endamálið við fundinum er at kunna spælarar, venjarar, leiðarar og onnur umboð fyri liðini, hvørjar broytingar – um nakrar eru – verða gjørdar í fótbóltslógini, og hvat dómarar, hjálpardómarar og 4. dómari serliga fara at hava eyguni við, tá dystir verða spældir.

Fundurin verður vanliga hildin stutt fyri kappingarbyrjan, og feløgini kunnu møta við upp til trimum umboðum hvørt. Mælt verður til at í minsta lagi høvuðsvenjari ella hjálparvenjari og liðskipari ella varaliðskipari á besta liðnum í felagnum møta til fundin.

Hjá teimum feløgum, ið hava vunnið sær rætt til at leika í evropeiskum kappingum, er týdningarmikið at leggja til merkis, at um tey ikki møta við omanfyri nevndu umboðum til fundin kunnu tey verða revsað av Aganevndini.

Á felagsstevfundinum verður árliga stevnan hjá Fótbóltssambandinum løgd fram. Endamálið við Stevnuni er at tryggja so einsháttaða avgreiðslu av teim einstøku dystunum sum gjørligt, so bæði tryggleikin hjá leikarunum, undirhaldsvirðið í dystunum, og andin í fótbóltslógini verða havd fremst í huga.

Stevnan er deild í tveir partar, ið eru fótbóltslógin (A) og fyrisitingarligu viðurskifti (B). Fyrri parturin er um, hvussu fótbóltslógin verður tulkað, og seinni parturin er um fyrisitingarlig viðurskifti í sambandi við dystir, t.d. tal av bóltdreingjum.




Stevnan fyri inniverandi ár er at finna á heimsíðuni hjá Fótbóltssambandinum.

# ALTJÓÐA LUTTØKA

Á hvørjum ári luttaka eitt ávíst tal av føroyskum liðum í UEFA kappingum: UEFA Champions League (UCL), UEFA Europa League (UEL) og UEFA Women's Champions League (UWCL).

**Fyrst og fremst** er týdningarmikið, at hesi feløgini hava í huga, at tey afturat treytinum fyri luttøkuloyvi til Betri deildina eisini skulu lúka treytirnar, ið eru ásettar í loyvisreglugerðini fyri luttøkuloyvi til UEFA kappingar.

## Lutakast

Nakrar vikur áðrenn hvørt umfar skipar UEFA fyri lutakasti, har avgreitt verður, hvussu spælt verður í komandi umfari. UEFA ásetir sum treyt, at øll feløg, ið eru partur av lutakastinum, skulu hava ein persón, ið umboðar felagið í sambandi við lutakastið. Tann, sum umboðar felagið í sambandi við lutakast, skal hava heimild til at gera avtalur um áseting av dystum og skal kunna veita mótstøðuliðnum kunning um m.a. leikvøll, ferðasamband og uppihald.

Feløg hava sjálvi ábygd av at skipa og rinda fyri ferðing í sambandi við lutakastið, ið vanliga fer fram í høvuðssætinum hjá UEFA í Nyon, Sveis.

## Leikarar

Hvørt felag, ið luttekur í UEFA kappingum skal lata inn ein leikaralista, sum inniheldur teir leikarar, ið felagið ynskir at skráseta. Tað er týdningarmikið, at felagið kannar nær freistin er fyri hesar skrásetingar.

Tað skal viðmerkjast, at bert leikarar, ið standa á leikaralistanum hjá viðkomandi felagi ***sita av leikbann.***

Allir leikarar, ið luttaka í kappingum hjá UEFA, skulu hava verið til neyðugu heilsukanningarnar, ið eru nærri útgreinaðar í UEFA Medical Regulations.

## Umboð frá UEFA og dómarar

***Til hvønn dyst í kappingum hjá UEFA luttaka fylgjandi umboð frá UEFA og dómarar:***

- 1 UEFA Delegate (umboðsfólk)
- 1 UEFA Referee Observer (dómaraeygleiðari)
- 4 dómarar

Afturat hesum eru tvey føroysk umboð, ið hava til uppgávu at taka sær av umboðum frá UEFA. Hesi eru Delegate Liaison Officer (DLO) og Referee Liaison Officer (RLO).

FSF samskipar gisting og ferðing hjá hesum saman við UEFA. FSF rindar fyri hetta.

UEFA delegate og hansara DLO verða boðin til almenna døgurðan, har umboð fyri bæði feløgini eisini verða boðin.



## Leikvøllir

Fyri at leika altjóða dystir krevst, at leikvøllurin er góðkendur av UEFA. Ein leikvøllurin kann vera góðkendur av UEFA sum UEFA Category 1 - 4 Stadium. Alt eftir, hvat umfar og hvørja kapping talan er um, er nærri ásett, hvør flokkur av leikvølli krevst. Hesar reglurnar eru nærri útgreinaðar í UEFA Stadium Infrastrcuture Regulations 2018.

***Í verandi løtu eru fylgjandi leikvøllir góðkendir í Føroyum:***

- Tórsvøllur, UEFA Category 3 Stadium
- Gundadalur, UEFA Category 2 Stadium
- Svangaskarð, UEFA Category 2 Stadium





# SJÁLVBOÐIN

Ein tann týdningarmiklasti parturin av einum felagi eru tær eldsálirnar, ið hvønn dag gera eitt ómetaliga stórt sjálvboðið arbeiði í felagnum. Hetta kann eitt nú vera at sita í nevnd, vera venjarar og hjálpa við praktiskum uppgávum í felagnum. Tað kann vera í sambandi við venjingar, kappingar, dystir ella hjálpa við at halda felagshúsið reint og rudduligt, alt eftir hvørjar eginleikar fólk hava at bjóða. Fyri at reka eitt felag er neyðugt við einum stórum toymi av hjálparfólki, ið hava ymiskar førleikar, og tí kunnu átaka sær ymiskar uppgávur.

**Ymiskt kann vera**, hvussu virkin hjálparfólk eru í felagnum. Nøkur kunnu røkja eina ávísa uppgávu í longri tíð, meðan onnur veita eina hjálpandi hond ein ávísan dag ella í sambandi við eitt ávíst tiltak, tað kann vera eitt nú, um felagið skipar fyri einum árligum fótbóltsskúla.

Kanningar eru gjørdar í fleiri londum um, hvussu feløg kunnu rekrutera hjálparfólk. Hesar kanningar vísa millum annað,

- at nógv vilja fegin geva eina hjálpandi hond, men eru ongatíð spurd. Tí er týdningarmikið, at man ikki undirmetir týdningin av at spyrja fólk ítøkiliga, um tey vilja hjálpa í felagnum.
- at tað er størri sannlíki fyri, at fólk sum frammanundan eru virkin í felagnum, siga ja til at átaka sær uppgávur. Hetta kann eitt nú vera foreldur ella vaksin, ið luttaka í heilsufótbólti. Hetta vísur samstundis eisini týdningin av, at felagið hevur eitt breiddartilboð, eitt nú til ungar og vaksnar leikarar, ið ikki hava ætlanir at røkka fyrsta liðnum, men sum elska fótbóltsspælið.
- at tað eru størri sannlíkindi fyri, at fólk siga ja, um talan er um avmarkaðar uppgávur. Nógv fólk vilja fegin hjálpa, men tey stúra fyri at hanga upp á størri uppgávur, sum kunnu gerast ein plága hjá teimum í longdini. Tað er tí týdningarmikið, at uppgávurnar eru avmarkaðar og væl útgreinaðar. Um tað eru fleiri, ið lyfta í felag, er oftani lættari at fáa enn fleiri fólk at hjálpa til.



- at fólk gjarna vilja hjálpa saman við øðrum, tá tað kennist léttari og møguliga ikki eins bundið. Tað kann tí vera eitt gott hugskot at savna fólk í størri og smærri arbeiðsbólkar. Samstundis eru nógv, ið eru hjálparfólk fyri tað sosiala, ið tað gevur at vera partur av felagnum. Hetta kann til dømis vera ein fyrrverandi leikari, ið fegin vil varðveita tilknýta til felagið og trivnaðin í felagnum.

- at fólk vilja gjarna hava uppgávur, ið geva meining fyri tey. Tað kundi millum annað verið at skipa fyri trivnaðartiltøkum í ungdómsdeildini. Tí kann tað eisini vera umráðandi, at fólk sleppa at halda seg til ta uppgávuna, ið tey játtað seg til at átaka sær,

- at nógv fólk óttast, at einasta uppgávan verður at "bidda" pengar til raksturin av felagnum. Hóast tað sjálvandi krevst fíggjarlig orka til at reka felagið, er týdningarmikið, at tey, sum hava játtað seg til aðrar uppgávur, sleppa at hugsavna seg um hesar. Um aðrar uppgávur verða trýstar niður yvir fólk, er stórur vandi fyri, at tey skjótt missa hugin at vera partur av felagnum.

Tað er týdningarmikið, at hjálparfólkini vera væl móttikin og vird í felagnum. Fyrst og fremst við, at tey vera boðin vælkomin í felagið á ein góðan hátt og kunnað um virksemið í felagnum (her kann klubhondbókin vera eitt gott amboð, sí meira um klubhondbókina á síðu 17). Ein nýggjur venjari eigur tí millum annað at vera kunnaður um, hvar útgerð er at finna, nær liðið skal venja, og hvussu samskifti við foreldur fer fram. Hetta gevur allarhelst eisini eina størri tryggleikakenslu.

## Varðveita hjálparfólk

Tá fólk hava játtað at gerast partur av felagnum, er týdningarmikið, at tey vera væl vird og viðfarin, so tey framhaldandi hava hug at vera partur av felagnum. Tað er sjálvandi ymiskt frá persóni til persón, nær ein kennir seg væl virdan og viðfarnan. Nøkur góð ráð kunnu tó vera:

- at hjálparfólk vera hoyrd, tí tað er oftani tey, ið hava mest vitan um ítøkiligu uppgávurnar. Starvsnevndin og onnur ábyrgdarfólk eiga tí altíð at taka hjálparfólk við upp á ráð, tá avgerðir verða tiknar. Um nýggir bóltar skulu keypast í felagnum, eiga venjarar at hava møguleika at siga sína hugsan um hesar (hetta merkir tó ikki, at teir skulu taka avgerð, men teir eiga at hava møguleika at siga sína hugsan).

- at hjálparfólkini hava eina kenslu av, at tað er skil á felagnum. At tey fáa neyðug boð (eitt nú um venjingar- og dystartíðir), og at tann útgerðin, ið er lovað teimum er tøk. Hjálparfólkini eiga samtundis altíð at vita, hvønn tey skulu venda sær til, tá tey hava spurningar um eitthvørt.

- at skipað verður fyri ymiskum tiltøkum fyri at takka hjálparfólki. Tað er ikki tað fíggjarliga, ið dregur hjálparfólkini, men flest øll vilja verða fegin um, at tey fáa eitt hvørt slag av herðaklappi. Hetta kann eitt nú vera ein hjálparfólkaveitsla, ella at tey fáa ein klædnapakka frá felagnum.

- at felagið takkar hjálparfólkum á eitt nú sosialum miðlum.


#samanfrainá